

# Varðveitið fólkapensjónina

Landsfelag Pensjónista heitir á løgtingið um at varðveita fólkapensjónina fyri øllø

– Latið mótrokningarfríu upphæddina sum útgangsstøði vera verandi 60.400 kr, og javnið hana við sama javningarprocenti sum fólkapensjónina. Ásetið eina nýggja skattskylduga grundupphædd, sum er eins fyri bæði gift og ógift, um 66.000 kr. Nýtið bert lønarinntøku, ikki pensjónsuppsparing, sum mótrokningargrundarlag í grundupphæddini. Javnið fólkapensjónina soleiðis, at hon ikki aftur fer at dragna afturúr í mun til lønarlagið, sigur Landsfelag Pensjónista, sum heilsar tingfólkum, at »Politikkur er at vilja!«

# Designfelag stovnað



Leygardagin var føroyska felagið fyri designarar, Designfelagið, stovnað. Limirnir í felagnum eru høgtútbúnir designarar innan grafik, klædnaskap, vevna- og bundnavørur, rúm, skap, møblar, mótaframa og tekning.

Umframt at skapa umstøður fyri fakligum netverki og førleikamenning vil felagið virka fyri at profilera og professionalisera design sum fakøki í føroyska samfelagnum.

Í nevndina eru vald Katrina í Geil, Sverri Heinesen og Hans Dávid Dam. Fyrsta nevndin hevur skipað seg við Katrinu í Geil sum formanni í Designfelagnum.




*Bogi Andreasen, sum er býráðslimur í Havn, ivast í síni politisku framtíð*

# Bogi ivast

**POLITIKKI Í Sosialinum fríggjadagin vísti Bogi Andreasen, sum umboðar Tjóðveldi í Tórshavnar býráð, sína misnøgd við flokkin. Hvussu hansara politiskar framtíð sær út, veit hann ikki**

Randi Jacobsen

Tað skortaði ikki upp á viðmerkingar, sum Bogi Andreasen, býráðslimur hjá Tjóðveldi í Tórhavnar býráð fyri eina grein í Sosialinum fríggjadagin.

Í greinini hartaði hann Tjóðveldi, sum í einum tilmæli mælir frá at lata kirkjur og samkomur sleppa frá at gjalda mvg. Hann segði eisini, at Tjóðveldi hevði flutt seg nógv frá tí, flokkurin stóð fyri, tá ið hann stillaði upp.

Síðan hava gitingar gingið um, at Bogi Andreasen er á veg yvir í Fólkaflokkin.

Bogi Andreasen flennir at hesum gitingum. Hann sigur, at hann als ikki hevur tikið støðu til, um hann fer at stilla uppaftur, tí arbeiðið fyllir so nógv, og honum dámar væl sítt arbeiði.

# Miðlafólk undir Vinnuhúsið

Allir sáttmálar á privata arbeiðsmarknaðinum á landi eru nú undir sama felag

1. apríl yvirtók Føroya Arbeiðsgevarafelag sáttmálan við Føroysk Miðlafólk frá Føroya Blaðútgevarafelag.

Hesi seinnu árini eru fleiri og fleiri sáttmálar komnir undir ábyrgd Føroya Arbeiðsgevarafelags, antin beinleiðis ella við, at onnur arbeiðsgevarafeløg eru vorðin limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag. Sáttmálin millum Føroya Blaðútgevarafelag og Føroysk Miðlafólk var hin síðsti, sum lá uttan fyri felagið.

Við hesum eru allir sáttmálarnir á privata arbeiðsmarknaðinum á landi undir Føroya Arbeiðsgevarafelag.




*Tummas Larsen vann fyrsta umfar í Singer/Sogwriter kappingini á Kafé Kaspar leygarkvøldið*

# Tummas Larsen í finaluna

**BILASØLA Fyrsta umfarið í Singer/Songwriter kappingini á Kafé Kaspar var leygarkvøldið**

Eirikur Lindenskov

Tað gjørdist Tummas Larsen, sum slapp víðari til finaluna í singer/songwriter kappingini á Kafe Kaspar í gjárkvøldið. Framførslan hjá honum varð av dómarunum mett at vera tann mest sannførandi og gjøgnumførda av øllum luttakarunum, og harvið varð hann valdur framum, hóast hini eisini høvdu fínar framførslur. Teir tríggir dómararnir Kristian Blak, Jón Tyril og Brett Perkins høvdu nógv positiv lýsingarorð at bera vinnaranum, ið fór uppaftur á pallin og spældi eitt lag afturat. Tummas skal so vera við aftur 30 apríl, tá finalan verður.

